

*Ein avriksløn kann eggja fólkum at leggja meiri sál í sitt arbeiði, heldur Niels Winther, formaður í BFL. Petur Petersen, aðalstjóri, tekur undir við tankanum um avriksløn*

# Avriksløn kann fáa fólk at støðast

**Fólk støðast illa í almennu umsitingini. Ein avriksløn kann bøta um trupulleikan, heldur BFL. Petur Petersen, aðalstjóri, tekur væl ímóti tankanum, men hann ávarar ímóti at fara fram í óðum verkum og mælir til, at tað verður væl fyrireikað, áðrenn lagt verður til brots**

AVRIKSLØN
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Avriksløn. Eitt nýtt gandaorð hevur stungið seg upp, nú partarnir á almenna arbeiðsmarknaðinum eru farnir til samráðingarborðið.

Heiðurin fyri tað eigur Búskapar- og løgfrøðingarfelagið, sum í einum almennum brævi hevur lagt upp til kjak. Niels Winther er formaður í BFL, og hann sigur, at tað eru fleiri orsøkir til, at felagið hevur tikið málið upp.

– Tað almenna hevur ein ógvuliga stirvnan lønarbygnað, sum ikki eggjar starvsfólkini. Longu eftir seks árum ert tú komin upp á hægsta lønarstig, og tað ger, at fólk leita sær aðrar leiðir eftir avbjóðingum. Vit halda, at avriksløn kann gera tað meiri áhugavert at arbeiða hjá tí almenna, halda fólkum til og geva teimum avbjóðingar og møguleika at fáa meira í lønarposan, sigur Niels Winther.

## Meira og skjótari

Sum er, loysir tað seg ikki at arbeiða meiri og skjótari, tí tað gevur einki eyka í løn.

Verður ein partur av lønini avriksløn, kann arbeiðsplássið røkka betri úrslitum, og starvsfólkini verða nøgdari, heldur BFL.

Sambært uppskotinum skulu umleið 15 prosent av lønini hjá almennum starvsfólkum vera avriksløn. Avtalur skulu gerast millum starvsfólk og leiðslur fyri eitt ár í senn, og tær skulu útgreina nágreiniliga, hvørji mál skulu røkkast. Tað kann vera, at málsviðgerðartíðin skal styttast, at álit skulu latast innan ávísa freist, ella at viðskiftafólk gerast nøgdari.

Tað ljóðar, sum almennu starvsfólkini gera ov lítið til nyttu í dag, men soleiðis heldur Niels Winther ikki, at hugskotið skal skiljast.

– Tey flestu arbeiða hart í dag, men vit hava einki ímóti at taka spurningin upp, og at okkara arbeiði verður eftirmett og skjalprógvað. Hví ikki motivera fólk til at gera okkurt eyka og fáa løn afturfyri? Í dag rýma fólk úr almennu umsitingini, so skjótt tey hava fingið royndirnar, og tað er óheppið fyri øll, sigur Niels Winther.

## Gott hugskot

Petur Petersen er aðalstjóri í mentamálaráðanum, og hann sigur seg taka væl ímóti fleiri tættum av avrikslønini.

– Eg haldi, at hugskotið við avriksløn er gott, og at tað eru nógvir partar av tí, sum kunnu brúkast skilagott. Men tað er av alstórum týdningi, at tað verður fyrireikað væl, so tað verður gjøgnuskygni í skipanini. Tað má vera púra greitt, hvørji mál eru galdandi fyri ta puljuna, sum verður latin til avriksløn, sigur Petur Petersen.

Hann sigur seg taka undir við grundtankanum aftan fyri avriksløn. Gert tú nakað serligt fyri títt arbeiðspláss, sum lyftir seg upp um tað vanliga, skal tú lønast afturfyri. Men samstundis heldur hann, at nógvir vandar eru á vegnum.

– Avriksløn er ikki egnað allastaðni. Í undirvísingarverkinum er tað eitt nú ivasamt, hvussu avriksløn kann latast einum lærara. Skal hann metast eftir ársmetinum hjá næminginum. Ella eftir próvtølunum? Tað er so ymiskt, hvat innihald almenn arbeiðspláss hava, og tí má takast hædd fyri, sigur Petur Petersen.

Hóast tað í stóran mun snýr seg um arbeiðsumhvørvi, um fólk eru nøgd og trívast á sínum arbeiðsplássi, so viðgongur Petur Petursen, at lønin eisini hevur týdning.

– Lønin er eitt element, sum tú ikki kanst síggja burtur frá, tá tað kemur til trivnað. Vit kunnu bjóða avbjóðingar í aðrar mátar við fakligum umhvørvi, avbjóðingum og netverki, men lønin liggur føst. Kann ein bonuspulja geva okkurt eyka, so vit varðveita fólk, so er tað áhugavert, og sigur BFL, at tað er ein gongd leið, so mugu vit taka tað til okkum, sigur Petur Petersen.

## Minni fyri meira

Ein atfinning ímóti avrikslønini hevur verið, at vandi er fyri, at fólk fara at arbeiða ov skjótt, so at tað gongur út yvir dygdina. Atfinningina heldur Petur Petersen verða viðkomandi.

– Fara vit undir eina skipan við avriksløn, so er tað alneyðugt, at tað ikki bara verður nøgdin av arbeiði, sum er umráðandi. Tað snýr seg eisini um góðsku, og tí er neyðugt, at málini vera væl definerað. Annars fáa vit skjótt minni fyri meira, sigur hann.

Málið um avriksløn er eisini ein spurningur um játtan. Og tí kann tað gerast eitt stríð millum politiska myndugleikan og fakfeløgini, hvussu tað skal fíggjast. Við Fregnir sigur Marjun Hanusardóttir, løgmansstjóri, at skal tað almenna lata starvsfólkum avriksløn, skal tað gerast innan fyri sama játtanarkarm sum nú. Einasti munurin skal vera, at ein partur av játtanini verður markaður til avriksløn. Hesum ivast Petur Petersen í.

– Fakfeløgini fara neyvan at ganga við til, at grundlønin lækkar, og at tey skulu renna meira fyri at vinna tað, tey longu fáa. Um avrikslønin eitt nú skal vera 15 ella 20 prosent av samlaðu lønarjáttanini, má tað gerast í fullari semju millum fakfeløg og politiska myndugleikan sum ein partur av avtalum teirra millum. Tað kann hugsast, at partarnir í framtíðini hava tað við í sáttmálasamráðingum, at ein partur av lønarhækkingini fer til avriksløn, sigur Petur Petersen, sum ikki væntar avriksløn í bræði.

## SMF ivast

Tað er BFL, sum er komið við uppskotinum um avriksløn beint upp undir samráðingarnar á almenna arbeiðsmarknaðinum. Felagið heldur sum sagt, at tað kann gerast ein góð motivatión hjá alment settum, at tey kunnu menna seg og fáa hægri løn á hendan hátt. Men Starvsmannafelagið hevur longu sett knyklar í brýr. Heini Joensen, næstformaður, ávarar ímóti, at tað kann skapa øvund og misnøgd á arbeiðsplássum, tá tey lægstløntu og millumleiðarar fáa avriksløn. Bara tá tað kemur til leiðarar, er avrikslønin ein hóskandi lønarskipan. Haraftur at vísir hann á royndir aðrastaðni, sum vísa, at mál vóru skjótari avgreidd, men at dygdin í málsviðgerðini versnaði munandi.



# Óhugaligur 15 ára føðingardagur

**Fríggjadagin fylti vardi verkstaðurin á Brekku í Klaksvík 15 ár. Men tað var ikki so hugaligt hjá teimum at halda dagin, tí sum nú er, er ein møguleiki fyri, at tey verða húsvill 1. juni komandi ár**

MENNINGARTARNAÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Fult hús í varda verkstaðnum fríggjadagin, tá stovnurin fylti 15 ár, men tað var ikki so hugaligt at halda dagin, tí um illa vil til, so kann stovnurin verða húsvillur í juni komandi ár*

**Klaksvík:** Í 15 ár hevur vardi verkstaðurin á Brekku verið til. Og í tey 15 árini hevur hann hildið til í bygninginum hjá Sjóklædnavirkinum á Brekku í Klaksvík. Men fyrr í ár varð ein politisk avgerð tikin um, at verkstaðurin skal flyta í hølini hjá Toll og Skattstovuni, norðoya Deild, sum so eisini fer at flyta. Sostatt varð sáttmálin við privata útleigaran uppsagdur til 1. juni 2004.

Jóna Olsen, leiðari á verkstaðnum, sigur, at tað skulu nógvar ábøtur og broytingar til í hølinum hjá Toll og Skatt, áðrenn tann bygningurin kann hýsa einum vardum verkstaði. Og tað kostar pengar. Pengar, sum enn ikki eru játtaðir.

– Um nú útleigarin hjá okkum finnur ein betri leigara, og so kunnu vit standa á gøtuni um níggju mánaðir. Hetta er ikki at síggja svart uppá tað, men frá september til juni er ikki long tíð í almennum tíðarbilum, sigur hon.

Og hartil sigur hon, at øllum stovnum varð álagt at spara, so mitt í árinum, varð skorið niður uppá játtanina hjá teimum, orsakað av størri íløgum

Økið hevur fingið játtað meira pening, men kostnaðurin av nýggjum stovnum og eisini tað, at tyngri brúkarar eru komnir inn í skipanina, hevur gjørt sítt til, at tað bleiv skorið niður uppá pengarnar hjá hinum. Hetta varð gjørt í juni.

– Tað er frustrerandi at missa pengar, sum vit hava, mitt í árinum, so tað er ikki serliga hugaligt at halda 15 ára føðingardag, sigur Jóna Olsen, leiðari á varda verkstaðnum á Brekku.

## Bíðistøða

Bjarni Clementsen, sum umsitum serforsorgina hjá almannaráðnum, sigur, at tað skal eitt umfatandi viðlíkahaldsarbeiði og broyting av innrættningi til í bygninginum, har vardi verkstaðurin skal flyta, áðrenn tað kann gerast veruleiki. Og hann heldur ikki, at tað loysir seg at gera nakað, áðrenn pengarnir eru játtaðir.

Arbeiðið, sum talan er um í fyribils kostnaðarmetingini, umfatar at skifta vindeygu, tak og hurðar – umframt at inntrætta, gera ein lyft og at gera ein verkstað í kjallaranum, har tað í dag bert er eitt goymslurúm. Kostnaðarmetingin er yvir 5 milliónir krónur, men tað er sum sagt bert ein meting, tí tann endaliga projekteringin er ikki gjørd.

Bjarni Clementsen sigur, at privati útleigarin veit av støðuni, sum hon er beint nú, og hann avsannar ikki, at tað kann fara at verða ein stórur trupulleiki, um útleigarin finnur ein annan leigara.

– Trupulleikin er hann, at eg fái ikki gjørt nakað, fyrr eg havi fingið at vita, um tað verður fuglur ella fiskur, so sum nú er standa vit í eini bíðistøðu, sigur Bjarni Clementsen. Hann vónar tó, at hava fingið greiði á hesum í hesum mánaðinum.




*Ein politisk avgerð er tikin um, at vardi verkstaðurin á Brekku í Klaksvík skal flyta í onnur høli, men enn eru ongir pengar játtaðir til at umvæla nýggju hølini so, at tey kunnu hýsa einum vardum verkstaði*

# Um seksti motorsúkklur á ferð sunnast í Føroyum

**Um vikuskiftið var Føroya MC Boogie 2003 II. Leiðin gekk til Suðuroyar og tali á luttakarum táttaði í seksti og tað var av sonnum ein hugtakandi sjón at síggja stórfingnu akførini í ikki minni stórfingnu náttúruni**

MOTORSÚKKLUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Av sonnum var tað ein stórfingin sjón, tá yvir 60 motorsúkklur ferðaðust kring Suðuroynna um vikuskiftið.

Men flestu motorsúkklur hava tvey setur og tað vóru eisini nógvar, sum vóru mannaðar við tveimum fólkum, so tilsamans tóku um 90 fólk lut í hesum tiltakinum, sum Føroya Ellisakfar skipaði fyri.

Føroya MC Boogie 2003 II var á skránni og Suðuroyggin skuldi koyrast á tamb. Leygarmorgunin gekk leiðin suðureftir og so var vitjað á Tvøroyri og í Famjin. Seinnapartin lá leiðin suður eftir oyggj og í Vági varð steðgað klokkan 15, sum ætlað í skránni.

Forvitnir áskoðarar leitaðu sær vestur á Eiðið, eftir at bikararnir høvdu koyrt ígjøgnum alla Vágsbygd. Hugtakandi akførini vóru ein vøkur sjón og náttúran vísti seg frá vøkru síðuni, nú vit skriva september.



*Seinnapartin leygardagin lá leiðin suður eftir oyggj, har steðgað var í Vági eina løtu Forvitnir áskoðarar leitaðu sær vestur á Eiðið, eftir at bikararnir høvdu koyrt ígjøgnum alla Vágsbygd. Hugtakandi akførini vóru ein vøkur sjón og náttúran vísti seg frá vøkru síðuni, nú vit skriva september*

*(Mynd: D. Olsen)*

Leiðin gekk so longur suður til Sumbiar og Akraberg. Á kvøldi var bikaraparty í Øravík, har luttakararnir eisini gistu.

Sunnudagin fingu Hvalba og Sandvík bikaravitjan og sunnudag seinnapart gekk leiðin aftur umborð á Smyril. Tað vil siga, at umleið helmingurin fóru norðuraftur við Smyrli, tí tað vóru ikki færri enn einar 30 motorsúkklur úr Suðuroynni, tað er umleið helvtin av teimum, sum vóru við í tiltakinum.

Men stóra luttøkutalið bendir á, at motorsúkklur hava vaksandi áhuga manna millum. Føroya MC Boogie taldi kvinnur og menn, ung og eldri. Og yngri og eldri akfør.

Sí eisini síðu fýra.